## DAGSINS MEINING

# Flogvøllur á Glyvursnesi

Nú Norðoyatunnilin gjørdist veruleiki verður so spakuliga tosað um, hvussu vit skulu raðfesta stórar samfelagsíløgur í framtíðini. Í hesum sambandi hevur longu verið tosað um at gera ein undirsjóvartunnil til Sandoynna.

Spurningurin um stórar íløgur í samferðslukervið eigur at fáa neyva viðgerð longu nú, hóast seinasta stóra verkætlanin, Norðoyatunnilin júst er liðug.

Her stingur so eitt "gamalt" mál seg framaftur. Tað er ein nýggjur flogvøllur.

Áðrenn undirsjóvartunnil varð gjørdur um Vestmannasund var tað tabu at nevna spurningin um nýggjan flogvøll. Í dag er støðan ein onnur. Góða sambandið til flogvøllin í Vágum ger hann meira attraktivan enn frammanundan. Arbeitt verður nú eisini við eini ætlan at longja vøllin og betra umstøðurnar har. Hetta eru vit øll samd um skal gerast. Tí hóast flogvøllurin í Vágum ikki telist millum teir bestu, tá talan er um veður, so er hesin komin fyri at verða.

Men við tíðini koma broytingar og nýggjar avbjóðingar, og spurningurin er, um vit ikki eru komin hartil, at ein flogvøllur aftrat eigur at fáa hægri samfelagsliga raðfesting. Tvs. at verandi flogvøllur og útbygging av honum eigur ikki at verða nøkur forðing fyri, at vit fáa enn ein flogvøll. Eitt samfelag sum tað føroyska, sum eisini skal taka hædd fyri altjóðagerðini, má hava tey best hugsandi samferðslusambondini til umheimin. Og tey fáa vit bert, um vit hava tveir flogvallir.

Í blaðnum í dag nemur ein av oddamonnunum hjá nýggja føroyska flogfelagnum FaroeJet og ein av teimum, sum hevur verið við til at menna Atlantsflog seinastu árini, við nettupp hetta fyrrverandi og lutvíst framhaldandi tabuevni, nevniliga nýggjan flogvøll á Glyvursnesi.

Pætur Rasmussen, sum hevur drúgvar royndir innan bæði flogferðslu og ferðavinnu og sum hevur arbeitt í Grønlandi í mong ár, heldur tíðina vera komna til, at vit grava framaftur ætlanina at gera ein flogvøll á Glyvursnesi. Hann vísir í hesum sambandi til framtíðar avbjóðingar so sum eina oljuvinnu og sigur, at verður olja funnin við Føroyar, fer hetta at seta stór krøv til flogferðsluna. Og hann heldur fyri, sum eisini rætt er, at tað vildi verið upplagt, at komandi inntøkur frá eini oljuvinnu, eisini vóru við til at fíggja ein nýggjan flogvøll.

Lat okkum geva slíkum viðmerkingum frá professionellum fólki ans og taka tær við í metingarnar, tá vit skulu til at raðfesta størri íløgur í undirstøðukervið og samferðsluna sum heild, antin hetta so er millum oyggjar ella millum lond. Hví ikki – nú tá Norðoyartunnilin er vorðin veruleiki – seta út í kortið ein nýggjan flogvøll, soleiðis at vit bæði tá røður um samferðslu í landinum og til og frá landinum, hava latið okkum væl í til framtíðar avbjóðingar.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Tingviðgerðir, Íslandssáttmáli, skúladepil v.m.

**JÓGVAN SUNDSTEIN**



Nútímans tøkni ger tað møguligt at fylgja rættiliga væl við heima á landi, sjálvt um ein er búsitandi uttanlands. Tó skal viðgangast, at okkurt kanska gleppur burtur í millum. Men flestu tíðindasendingarnar í Útvarpinum og Dag og Viku sendingarnar í Sjónvarpinum fær ein kortini við.

Seinastu dagarnar hava einar tvær hendingar ørkymlað meg rættiliga nógv. Tað snýr seg um orðaskifti á tingi, serliga málburðin, men eisini sjálvar viðgerðirnar.

### Íslandssáttmálin

Tað hevur undrað meg nógv, at tingmenn skulu gera tað til eitt so avgerandi og prinsipielt mál, um ein millumlandasáttmáli verður samtyktur sum uppskot til samtyktar ella sum løgtingslóg. Báðir formarnir eru møguligir og hvørgin er í sjálvum sær í stríð við stýrisskipanarlógina ella tingskipanina. Tann mest einfalda mannagongdin er ofta uppskot til samtyktar, men lógaruppskot kann við hvørt vera tryggari. Tað veldst um innihaldið í viðkomandi sáttmála.

Men tað, sum í hesum førinum ræðir meg, er tann bastanti hátturin serliga løgtingsformaðurin og formaðurin í uttanlandsnevndini føra seg fram. Eitt er at ynskja formin við uppskoti til samtyktar, men so at atkvøða ímóti sáttmálanum í lógarformi, tað vísir ikki stórt álvara í málsviðgerðini. Tað, sum síðani hendir, er, at tingformaðurin alment sigur, at tingmenn ikki hava atkvøtt eftir síni sannføring. Hetta er ein álvarsom skuldseting bæði móti tingmonnum og eisini móti løgmanni, sum formaðurin sigur hava trýst tingmenn at atkvøða fyri sínum uppskoti. Soleiðis sum eg hoyrdi samrøðurnar í Útvarpinum var tað meira enn ein vanlig kurla á tráðnum millum løgmann og løgtingsformannin. Tað boðaði ikki frá góðum samarbeiðsviðurskiftum.

Tá ið tingformaðurin alment skuldsetur tingfólk fyri ikki at fylgja síni sannføring kann hann ikki sleppa við, at hetta bara verður sent út í luftina og síðani gloymt. Løgtingslimir eru bert bundnir av sannføring síni, stendur í stýrisskipanarlógini. Tá ið formaðurin skuldsetur sínar limir fyri at bróta hesa lóg er nakað spinnandi galið, antin við formanninum ella við tingmonnunum. Í øllum førum má formaðurin prógva sína skuldseting. Um hann ikki kann hetta eru bert tveir møguleikar eftir. Annar er at biðja um umbering ella at leggja frá sær sum formaður.

### Orðalagið á tingi

Tað var skelkandi at hoyra úrdrag av orðaskiftinum um skúladepilin í Marknagili. At hoyra menn kalla aðrar »gleðisgentur«, at vilja leggja starvsfelagar inn á psykiatriskar deildir, at sita og rópa eftir røðarum niðri frá tingsalinum, tað hoyrir ikki heima í einum parlamenti. Í hvussu so er ikki um okkara leiðir. Eg var sjálvur tingmaður í 24 ár, men líknandi galimatias minnist eg ikki. Og so skilti eg, at formannskapurin ikki talaði at.

Annars gleddi tað meg, at skúladepilin í Marknagili nú endiliga verður veruleiki. Í sjeytiárunum arbeiddu vit tríggir vinnuskúlar fyri einum slíkum útbúgvingardepli (Maskinskúlin var tá við saman við Tekniska Skúla og Handilsskúlanum), men í tí umfarinum kom bert Handilsskúlin. Annars skilji eg ikki, hví menn hava so nógv ímóti sjálveigandi stovnum. Vit hava í mong Harrans ár arbeitt við slíkum skúlastovnum, og vit hava arbeitt við fígging av skúlabygningum eftir reglum, har slíkir stovnar fáa tilskot eftir útreiðslum til rakstur, avdráttir og rentir yvir eitt vist áramál, og tað hevur riggað væl. Ein skúlabygningur er ikki ein eingangsútreiðsla, men nakað sum hevur varandi virði í mong ár.

Men fyri at koma aftur til tey, sum manna Løgtingið: Gott í tykkum lærið tykkum vanligan fólkaskikk.

# Tórbjørn og sannleikin

**JOHN JOHANNESSEN**
løgtingsmaður



### Svar til ófantaligheitir og persónliga útspilling hjá Tórbjørn Jacobsen

Tað er ein sannroynd, at Tórbjørn Jacobsen ikki tolir politiska mótstøðu, uttan at taka til skitin vápn, sum hann gjørdi í tinginum hósdagin.

Í bløðunum heldur Tórbjørn Jacobsen fram við ljótari persónligari útspilling av mær.

Mítt ikast til hetta skitna kjak er, at fólk kunnu fara inn á heimasíðuna hjá løgtinginum (www.logting.fo) og lurta eftir orðaskiftinum við 2. viðgerð av tingmáli 112/2005 um miðnámsskúla í Marknagilgi, so hoyra tit sjálvi hvussu leikur fórst.

Umframt hetta kunnu fólk leita fram tær óteljandi greinarnar hjá Tórbjørn Jacobsen við ljótum persónsálopum móti ymiskum persónum.

Hetta skuldið verið nóg mikið til at mett um sannleiksvirðið hjá Tórbjørn Jacobsen.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:**
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.